# Brúdleypið st

**Tey hittust til eitt brúdleyp í Kirkjubø, so hvat var meiri natúrligt fyri Sigert og Aliku sjálvi at giftast í føroysku mentanarháborgini. Og brúðarveitslan stóð í fjósinum**

## Brúdleyp

Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Tað er nú ein tíð síðani, at fjósið hjá bóndanum í Kirkjubø hýsti neytum. Seinastu mánaðirnar hava fornfrøðingar skrásett gamlar steinar í fjósinum, men fríggjakvøldið í farnu viku vóru steinar, básar og alt tað, ið kundi mint um fjós, beint burtur.

- Upprunaliga var ætlanin bara at hava kalt borð í Roykstovuni, men Jóannes, bróður, hevur leingi hugsað um at nýtt fjósið til onkur mentanarlig tiltøk, og har av spratt hugskotið at halda brúðarveitsluna inni har, sigur Sigert Patursson.

Líka síðani tankin kom fram í januar mánað, eru vikuskiftini nýtt til fyrireikingar. Og tað er nógv at taka sær av, tá eitt brúdleyp stendur fyri framman.

- Básarnir stóðu uppi, so teir skuldu allir takast niður. Alt skuldi málast og vaskast og snøggast um, men familjan er stór, og tað plagdi ikki at standa á, at fáa fólk at taka eina hond í. Tað hevur tað heldur ikki gjørt í hesum førinum, og vit eru takksom fyri alla hjálpina, vit hava fingið, sigur Sigert Patursson.

Forngripasavnið hevur annars leigað fjósið til skrásetingarnar av steinunum, men teir vóru allir fluttir upp á loftið til serliga høvið fríggjakvøldið.

- So hvørt, sum tíðin nærkaðist til brúdleypið, mátti hvørt kvøld nýtast at gera klárt. Tíbetur hava summi fingið summarfrí, og kundu tí taka eina eyka hond í, so tað eydnaðist at fáa alt klárt til tíðina, sigur Sigert Patursson.



*Sigert og Alika vórðu vígd í kirkjuni í Kirkjubø*
*Mynd: Ole Wich*

### Hóskandi matarskrá

Sum nevnt var uppruna ætlanin at hava kalt borð, men nú veitslan varð flutt inn í fjósið, bleiv eisini matarskráin broytt.

- Eitt, sum vit mátti baksast rættiliga fitt við, var borðskipanin. Vit fingu borð ymsastaðni frá, millum annað úr Dali. Tey vístu seg at vera heldur smalari og so passaði beinskipanin eisini betri, so stólarnir fingust inn undir borðini, sigur Sigert Patursson.

Ein bróður brúðgómin siglir við grønlendskum rækjubáti, og hann syrgdi fyri forrættinum, sum sjálvandi var rækjubland. Ógvuliga passandi, nú veitslan stóð í einum fjósi, var høvuðsrætturin oksakjøt, og